# BÍLIGA GRAVIMASKINU?

HER ER HON



**Gravmaskina TB-001**
Diesel motor • vekt: 600 kg.

Prísur bert 40.000,00 kr uttan mvg.

Setur tú hana saman sjálvur fæst hon munandi bíligari.

**O.K.HEILSØLA & MASKINUR FO 430 HVALVÍK**
TLF. 422394 - WWW.OKHEILSOLA.COM

Atlantic Brokers Ltd

## Stál línuskipið GULLBERG



er til sølu - við ella uttan loyvir.
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com

Kappingarráðið

# Løgfrøðingur og Búskaparfrøðingur til skrivstovuna hjá Kappingarráðnum

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum søkir við hesum eftir einum løgfrøðingi og einum búskaparfrøðingi at byrja sum skjótast. Uppgávan hjá Kappingarráðnum er at umsita løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping, og frá 1. januar 2008 nýggju kappingarlógina: nr. 35 frá 3. mai 2007. Lógin hevur til endamáls, við virknari kapping, at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

Við nýggju kappingarlógini fær føroyskt vinnulív somu karmar sum vinnan í grannalondunum. Hetta merkir, at fyrsta uppgávan hjá nýggju fulltrúunum verður at fyrireika vinnuna til hesar stóru broytingar.

## Búskaparfrøðingurin

Arbeiðið hjá búskaparfrøðinginum fevnur í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna búskaparfrøðiliga førleikan á kappingarlógarøkinum

## Løgfrøðingurin

Arbeiðið hjá løgfrøðinginum fevnur í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna løgfrøðiliga førleikan á kappingarlógarøkinum

## Førleikar

Vit vænta at tú hevur:
- viðkomandi samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni. T.d. cand.jur, cand.merc.jur, cand.scient.pol, cand.oecon.
- góð analýtisk evni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og hava hegni til at samstarva og at arbeiða undir trýsti.

Harumframt kunnu verða líknandi uppgávur at loysa fyri Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.

## Skrivstovan hjá Kappingarráðnum bjóðar

Eitt sera fjølltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri nógvum samskifti við norðurlendskar kappingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Vit kunnu bjóða góðar skeiðs- og eftirútbúgvingar-møguleikar, og luttøku á ráðstevnum innan kappingarlógarøkið.

## Setanartreytir

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við búðskapar- og lógfrøðingafelagið. Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

Kappingarráðið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 31. august 2007 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja Sigurðsson, deildarleiðara tlf. 35 60 41 ella Jógvan Thomsen, stjóra tlf. 35 60 21.

Skálatrøð 20 · Postboks 73 · F0-110 Tórshavn · Føroyar · Tel + (298) 35 60 40 · Fax + (298) 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo